Føroyskur stílur

<u>Hesar røkjuskapsreglur skulu fylgjast:</u>

- **Millum reglurnar: 1,5**
- **Breddar: Vinstri og høgri breddi skulu vera beinir**
- **Skriftstødd: 12**
- **Skrift: Times New Roman**
- **Yvirskrift**
- **Skrivað hevur**
- **Dagfesting**
- **Skúli**
- **Lærari**

<u>GG!</u>

Hesin stílur skal latast inn í seinasta lagi 06. november 20*13*.

Hjartaligan skrivihug☺

Unnist mær áðrenn síðstu nátt
(J.H.O.Djurhuus)

Unnist mær áðrenn síðstu nátt,

hoyra havsins øtlandi andadrátt,

síggja stormský á ferð.

Linnist mær lund

av keldukæti úr mosagrund,

um bil, tá ið børn henta ber.

Og lógvin so sára læt,

men marmennilin av lukku græt

millum tonglar og igulker.

Veri tað síðsta, ið ger mær mun,

tá ið alt sloknar: vit og grun

fjalladun.

Komi til mín sum síðsta glott,

tá fyri hond er ferð av gátt,

stjørnunátt.

Veri tað stjørnur og fjalladun.

Sámal Joensen Mikines, Súgur við lendingina, 1952



Stíg, seggur, oman Golgata

(J.H.O.Djurhuus eftir Johannes Ewald))

Stíg, seggur, oman Golgata,
ber herskjøldur í hond!
Til heljar synd og deyða slá,
ið tyrpast mær í nánd!

Hevj búnan brand í vreiði hátt
mót teim, ið háða teg,
og rek teir út í heljarnátt
frá mær og ljósins veg!

Tá bjargaði mær megin tín,
ei deyðan óttast meir,
so fróur frelsti andi mín,
skeyt hamin – mold og leir.

Marc Chagall, Exodus, 1952



Ver sterk mín sál
(J.H.O.Djurhuus)

Ver sterk mín sál á køldu náttarvakt,
har eingi altarljós brenna,
har hvør ein vón av fannkava varð takt,
og hjarta ongan hita meir kann kenna;
ver stór mín sál sum rúmdar kalda tøgn,
ið eina er, tá ið sloknar lívsins søgn.

Ver sterk mín sál á mjørkatungu ferð, har
tættar fylkjast um teg gráar gátur – tín
barnaflokkur – úttærdur hann er,
og sárur kennist hans sólsvangi grátur;
ver stór mín sál í dagsins royndar stund,
holl veitir nátt hin dreymaleysa blund.

Sámal Joensen Mikines, Sakn, 1934

Stílevni 1:

- Tulkið yrkingina og dragið málningin við í tulkingina!
- Hvørji evni viðger yrkingin?
- Hvørjari sálarligu støðu er eg-persónurin í?
- Hvat er tað, sum eg-persónurin vónar, at honum unnist áðrenn síðstu nátt?
- Hvat vóna tit, at tykkum unnist áðrenn síðstu nátt?

Stílevni 2:

- Tulkið yrkingina og dragið málningin við í tulkingina!
- Hvørji evni viðger yrkingin?
- Hvør er *seggur*? Og hvør er eg-persónurin í yrkingini?
- Hvat merkir Exodus? Hví man málningurin eita *Exodus*?

Stílevni 3:

- Tulkið yrkingina og dragið málningin við í yrkingina!
- Hvørji evni viðger yrkingin?
- Hvørji sálarligu støðu er eg-persónurin í?
- Er kalda náttarvaktin ein ítøkilig nátt ella ein sálarlig støða?